***<u>Røða hjá Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu, til tiltakið 24. november 2023 í Smæruni “Altjóða dagur móti harðskapi móti kvinnum”</u>***

I morgin er 25. november og **Altjóða dagur móti harðskapi móti kvinnum**. Eitt av mínum ábyrgdar økjum sum landsstýriskvinna er harðskapsøkið. Tí fegnist eg stórliga um, at hetta tiltakið aftur í ár er fyriskipað.

Undir yvirskriftini “Frá græsrótarørslu móti professionalismu” – seta vit hol á eina spennandi skrá fyri dagin. Og eg gleði meg at fáa eitt nógv betri innlit í harðskapsøkið og hvussu hetta hevur ment seg gjøgnum tíðina, og hvat status er í dag.

*

Árið í ár er samstundis árið, tá nýggja heildarætlanin um harðskap í parløgum og nærsambondum 2023-2028 varð handað mær og landsstýrinum.

Við teimum 20 átøkunum byggir hetta arbeiðið víðari á væleydnaðu royndirnar frá fyrru heildarætlanunum eins og tær royndir, ið eru mentar innan harðskapsøkið, bæði í Føroyum og uttanlands.

Fyri at fáa eitt nøktandi og upplýst grundarlag at arbeiða og taka støðu út frá, hava bæði myndugleikar, felagsskapir og einstaklingar, verið tikin við uppá ráð og hava latið vitan, royndir og góð ráð, sum hava verið avgerandi fyri nýggju heildarætlanina.

*

Lyklaorðið er menning. Menning av fakligari vitan innan harðskapin.

Gongd er longu sett á hetta arbeiðið, har tit starvsfólk í Kvinnuhúsinum við tykkara fakligu vitan hava gingið á odda.

Tað er tó ein sannroynd, at tykkara arbeiðsumstøður og arbeiðsorka ikki hevur verið nokk til at røkka málinum, við at savna inn, menna og føroyska tilfar at brúka í vísindaligum kanningum, til upplýsing og kunning.

Hetta verður tí eitt neyðugt næsta stig fyri at basa harðskapi. Tí okkum tørvar at fáa skapt eitt mál fyri at kunna seta orð á harðskapin og soleiðis at fáa brotið tøgnina og lagt lunnar undir eina neyðuga hugburðsbroyting.

*

Heildarverkætlanin avdúkaði eisini, at eitt afturvendandi evni, ið borgarar sóknast eftir er, at tað er **<u>eitt stað</u>** at venda sær til, tá brúk er fyri hjálpini.

Tørvur er tí á einum staði við hollari fakligari vitan at venda sær til dulnevnt, bæði hjá harðskapsraktum, fremjarum, avvarðandi og – ikki minst – hjá fakfólki. Eftir tørvi skal tað frá hesum staði bera til at verða víst til neyðugu hjálpina, sum eigur at verða tryggjað øllum pørtum.

Vit tosa her um ein nýggja dulnevnda hotline, sum fáast skal at virka. Hetta arbeiðið byrjar í komandi ári

*

So hóast nógv er ment rætta vegin seinastu árini, so er neyðugt, at vit alla tíðina taka av møguleikanum, at fáa eitt **enn betri** innlit í økið. Og við støði í hesum eisini **rúma tí neyðuga kjakinum**, sum flytur menningina longur fram á leið.

At basa harðskapi er eitt samfelagsmál, sum vit øll eiga at vera við til at loysa. Áhaldandi mugu vit raðfesta, bæði í mun til at fyribyrgja og at steðga harðskapinum. Og ikki minni við áherðslu á eina neyðuga hugburðsbroytinga.

*

Tiltakið er fyriskipað í samstarvi millum Kvinnuhúsið, Kvinnufelagið og Sig frá/Almannamálaráðið. Eg fegnist um, at tit taka stig til hetta. Og ikki minni gleðist eg um, at tiltakið eisini verður stroymt. So eru vit fleiri, ið kunnu fylgja hesi spennandi skrá, sum løgd er fyri dagin. 1000 takk skulu tit hava fyri tað.

Hjartaliga vælkomin til hendan spennandi dagin og takk fyri at eg møguleikan at seta tiltakið

***Sirið Stenberg, landsstýriskvinna.***